At senda til TAKS

TAKS
Postrúm 2151
FO-165 Argir

# Umsókn um frítøku fyri at rinda mvg í sambandi við vælgerandi tiltøk

## Fyriskipari

| | |
|---|---|
| Navn: | V-tal: |
| Gøta og nr.: | Telefon: |
| Postnr. og bygd/býur | |

## Tiltakið

| | |
|---|---|
| Slag: | |
| Tíðarskeið (frá og til): | |
| Stað: | |
| Yvirskotið fer óskert til: | |

Viðtøkurnar skulu leggjast við.

Kunngerð nr. 136 frá 17.06.1993 um meirvirðisgjald er viðheft.
Sí eisini viðløgdu vegleiðing

____________________ , tann / 20 ____________________

Staður — Undirskrift hjá fyriskipara

### Til TAKS at útfylla

TAKS váttar frítøku sambært kunngerð nr. 136 frá 17.06.1993.
Kunngerðin viðheft.

____________________ , tann / 20 ____________________

Staður — Stempul og undirskrift hjá málsviðgera

# Kunngerð nr. 136 frá 17.06.1993 um meirvirðisgjald

**§ 1.** Tiltøk (Basarar, konsertir, loppumarknaður v.m.) hvørs yvirskot burturav verður nýtt til vælgerandi ella á annan hátt almannagagnligt endamál, kunnu eftir umsókn verða frítikin fyri at rinda avgjald.

**Stk. 2.** Loyvi sambært stk. 1, kann verða givið til hesi tiltøk:

1) Eitt mánaðarligt tiltak, ið varir upp til 3 dagar.
2) Eitt árligt tiltak, ið varir upp til 14 dagar, ella 2 tiltøk, ið vara upp til 8 dagar.
3) Einsháttað, samanhangandi tiltøk, ið verða hildin eina ferð um árið einstakar dagar, fleiri vikur ella mánaðir upp í saman, ið tilsamans vara ikki meira enn 14 dagar.

**Stk. 3.** Søla av vørum og tænastum skal fara fram eftir rokning og ábyrgd fyrireikarans, og fyrireikarin má ikki annars reka virksemi við sølu av samsvarandi vørum og tænastum.

**§ 2.** Innsavnan og søla av brúktum lutum við lítlum virði t.d. fløskur, pappír og metal, ið vera fyriskipað av vælgerandi feløgum v.fl. kunnu eftir umsókn vera frítikin fyri at rinda avgjald.
**Stk. 2.** Frítøka sambært stk. 1, er treytað av, at felagið ikki annars rekur skrásetingarskyldugt virksemi, og at sølan burturav fer fram til skrásett virki.

**§ 3.** Umsókn um frítøku fyri at rinda avgjald skal sendast Toll- og Skattstovu Føroya.
**Stk. 2.** Virki, ið verða frítikin fyri at rinda avgjald, skulu ikki skrásetast hjá Toll- og Skattstovu Føroya. Tílík virki skulu ikki tilskila meirvirðisgjaldsupphædd ella á annan hátt tilskila, at fakturaupphæddin er íroknað meirvirðisgjald á fakturair, avrokningarskjøl. v.m.
**Stk. 3.** Frítøka verður ikki veitt fyri meirvirðisgjald av keypi í samband við fyriskipan av teimum í §§ 1 og 2 umrøddu tiltøkum.

**§ 4.** Henda kunngerð fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 166 frá 3. desember 1992 um frítøku fyri avgjaldsskyldu sambært lóg um meirvirðisgjald fyri vælgerandi tiltøk.

## Vegleiðing

### Roknskapur

Roknskapur skal gerast fyri hvørt tiltak, ið skjalprógvar, hvat yvirskotið er nýtt til. TAKS kann biðja um roknskapin fyri at kanna, um felagið uppfyllir treytirnar fyri frítøku fyri mvg av sølu og frá skylduni at lata sjálvuppgávu inn.
Roknskapurin skal goymast í 5 ár eftir, at roknskaparárið er liðugt.
Bíðast kann eisini við at brúka yvirskotið til seinni, treytað av at yvirskotið, íroknað rentur, verður brúkt til eitt ávíst vælgerandi ella almannagagnligt endamál, og at:

- upphæddin verður sett inn á bundna kontu, ella
- upphæddin fer í grunn

### Dømir um hvat yvirskotið skal brúkast til

Yvirskotið av tiltakinum skal brúkast til vælgerandi ella á annan hátt almannagagnligt endamál, hetta skal skiljast bókstavligt. Verður nakað av yvirskotinum brúkt til annað endamál, verður mvg-frítøkan ikki góðtikin.
Vælgerandi ella á annan hátt almannagagnligt endamál kann t.d. vera:

- Fyribyrgjandi arbeiði móti sjúkum
- Fyribyrgjandi barna- og ungdómsarbeiði
- Neyðhjálp uttanlands
- Kirkjuligt arbeiði
- Áhugaarbeiði innan ítrótt

Mvg-frítøkan er eisini galdandi, um yvirskotið fer til t.d. bygging og rakstur av kirkjum, ítróttarhøllum, skótahúsum, frítíðarheimum, ungmannafeløgum o.l. fyri børn og ung.

### Dømir um hvat yvirskotið ikki kann brúkast til

- Politiskt/tvørpolitiskt arbeiði
- Ferðastuðul
- Rakstur í feløgum, t.d. bygdarhúsum, mentunarhúsum o.l.
- Lokalút- og sjónvarpsvirksemi

T.d. kann eitt tvørpolitiskt felag, sum skipar fyri einum tiltaki, bert verða frítikið fyri at gjalda mvg um yvirskotið verður latið til eitt vælgerandi endamál.

Tiltøk fyri einstaklingar, ella smærri bólkar, t.d. ein skúlaflokk, eru ikki almannagagnlig og kunnu sostatt ikki verða frítikin fyri at gjalda mvg.

### Keyp av vørum og tænastum eru ikki mvg-frítt

Felagið kann ikki fáa mvg-frítøku fyri innkeyp í sambandi við tiltøk.